# Skattastigin lækkar eitt vet – eitt stig á røttu leiðini

**Í løtuni liggur uppskot um skattalætta í tinginum. Skattauppskotið viðførur at skattastigin verður broyttur. Fyrstu ferð í ár og aðru ferð í 2004. Broytingarnar í skattastiganum gera, at marginalskatturin lækkar eitt vet. Tað er positivt, men enn er langt á mál**

SKATTALÆKKING
*Vinnuhúsið*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt uppskot fyri tingið um skattalætta uppá tilsamans 123 milliónir krónur yvir tvey ár. Ein partur av hesum skattalætta verður nýttur til at lække hægsta marginalskattaprosentið frá 37% til 36%.

Hetta er avgjørt eitt stig á røttu leiðini. Men enn er langt á mál.

Hóast skattalættan, rinda tey sum vinna eina miðalinntøku beint omanfyri 170.000 krónur, á leið 57% í marginalskatti, um kommunuskatturin og kirkjuskatturin eru tilsamans 20% og hædd verður tikið fyri gjøldunum til arbeiðsloysistrygging, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn og barsilsgrunn.

170.000 er ikki nøkur háinntøka, men hóast tað verður henda løn toppskattað. Til dømis fær ein


*F'íggjarmálaráðið*

persónur, sum er løntur eftir fastlønarsáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag, 15.900 krónur um mánaðin ella 190.800 um árið.

Hetta ger tað sjálvandi minni áhugavert hjá løntakaranum at taka eyka tøk. Verður arbeitt ein tíma ella tveir yvir, verða 57 oyru av hvørjari vunnari krónu inndrigin í skatti, áðrenn lønin verður útgoldin. Motivatiónin, sum átti at ligið í eini bonusskipan, fánar burtur av hesum, tí hvørja ferð løntakarin kýtir seg, fellur skattahamarin.

Neyðugt er at lække skattaprosentið munandi á seinast vunnu krónunum. So hóast nýggi skattastigin hjá Karstini Hansen er eitt stig á røttu leiðini, er framvegis langt á mál.





**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Føroya Sparikassa P/F**

fríggjadagin 21. mars 2003, kl. 17:00
í B36-húsinum, Gundadalur, Tórshavn.

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Sparikassanum ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á stjórnarskrivstovuni Yviri við Strond 2, Tórshavn, frá 13. mars 2003.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt men ikki atkvøðurætt.

Atgongdarkort verða á deildum Sparikassans útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003 hava biðið um hetta.

Tórshavn, hin 21. februar 2003.

Nevndin

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo


# Hýsuprísin lækkaður upp til 6 kr orsakað av kursfalli

**Amerikanski dollarin og bretska pundið eru fallin munandi í mun til krónuna seinasta árið. Stórabretland og Amerika eru einastu marknaðir av týdningi fyri hýsu og hetta ger, at kursfallið beinleiðis ávirkar tað sum fæst fyri hýsuna. Tað eru ongi útlit fyri, at kursurin fer uppaftur í bræði**

SKATTALÆKKING
*Vinnuhúsið*



Kursurin á amerikanska dollaranum í mun til krónuna er fallin við 20% frá februar 2002 til í dag. Hetta vil við øðrum orðum siga, at um ein amerikanskur innflytari rindaði føroyska útflytaranum 6,50 dollarar fyri eitt kilo av hýsuflaki í januar 2002, so gav tað føringinum 55,90 kr. Um amerikanarin rindar 6,50 dollarar í dag so gevur tað bara 44,60 kr. Hetta er ein munur uppá heilar 11,30 kr fyri hvørt kilo av flaki, sum svarar til 5 – 6 kr fyri kilo á føroyska ráfiskamarknaðinum.

Bretska pundið er fallið 11% frá februar 2002 til í dag. Hetta vil aftur siga, at um prísurin var tann sami í pundum so kundi ein vøra sum fyri einum árið síðani gav 55,00 kr til útflytaran bert geva 49,00 í dag. Príslækkingin bara orsaka av kursinum er sostatt 6,00 kr, sum aftur svarar til uml. 3,00 kr á føroyska ráfiskamarknaðinum.

Ávirkanin frá kursfallinum er eitt, men afturat tí kemur, at prísurin í dollarum og pundum eisini er fallin munandi. Stórar nøgdir av hýsu eru á marknaðinum og eftirspurningurin er lítil. Hesin ójavnin millum útboð og eftirspurning á altjóða hýsumarknaðinum sæst eisini aftur á føroyska ráfiskamarknaðinum og ávirkar prísirnar fleiri krónur afturat.

Kursir frá Nationalbankanum:
Amerikanski dollarin 28.02.2002 Kursur 859,06
Amerikanski dollarin 27.02.2003 Kursur 686,35
Bretska pundið 28.02.2002 Kursur 1216,02
Bretska pundið 27.02.2003 Kursur 1085,60


**Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!**
**Setið tygum í samband við okkum, - tað loysir seg!!**

AVIS BILÚTLEIGAN

*Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535*
*Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800*
*Teldupostur: avis@post.olivant.fo*


PRIX
NR. 46 • FRÍGGJADAGUR • 7. MARS 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

## Ringarnir

28 bólkar eru við í Prix Føroyum í ár, og nógvir av hesum bólkum vóru fullkomiliga ókendir, tá ið kappingin byrjaði. Men nú hava longu fleiri av bólkunum gjørt vart við seg, og ringarnir breiða seg í vatninum.

Bólkar sum Flux, Mind's Eye og Crashwave hava spælt á nógvum konsertum síðani luttøkuna í Prixnum.

Á 15 teimum bestu eru fleiri av Prix-bólkunum umboðaðir í hesum døgum. Mind's Eye, Crashwave og Flux komu inn á listan seinasta leygarkvøld, og hesaferð fáa S.C.A.T.G.O.H., onkikanndiskuterast.alt kann og Side Effect.

Í næstum verða fleiri konsertir, har Prix-bólkar skulu spæla.

# Tað eru boð eftir Prix-bólkum


*Mary's Baby er ein av nýggju bólkunum, sum er komin fram á føroyska tónleikapallinum seinastu vikurnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað er rættiliga gravgangur eftir bólkunum, sum taka lut í Prix Føroyum. Nógvar konsertir verða hildnar kring landið, og Prix-bólkarnir eru heit nøvn til hesi tiltøk. Eisini á 15 teimum bestu florerar við Prix-nøvnum í hesum døgum**

KONSERTIR
*Eyðun Klakstein*

Nógvir tónleikabólkar fara við í Prix Føroyar tónleikakappingina fyri at gera vart við seg, og tað er líkt til, at tað ber væl til at koma fram gjøgnum kappingina.

Konsertvirksemið í Føroyum blómar í hesum døgum, og tað eru fyrst og fremst bólkarnir, sum eru við í Prixnum, sum spæla til tey ymsu tiltøkini kring landið.

Bara seinastu tvær vikurnar hava tríggjar stórar konsertir verið. Í TB-húsinum spældu Hatespeech, Side Effect og Flux í Badmintonhøllini vóru Mind´s Eye, Hatespeech, Flux og Masha á pallinum, og í Losjuni í Gøtu spældu Hatespeech og Crashwave.

Onnur tiltøk verða eisini í næstum, har Prix-bólkar skulu spæla.

### Flux nógv at gera

Ein av bólkunum, sum hevur verið nógv umbiðin farnu tíðina, er Flux, sum var við í fyrsta innleiðandi umfarinum síðst í januar mánaði.

– Stutta tíð aftaná at vit høvdu verið við í Prixnum, vóru vit bidnir um at spæla til fýra ymiskar konsertir. Vit hava verið virknir síðani seinasta Prixið, men tað hevur verið misjavnt við uppgávum. Nú var knappliga ov mikið at gera, sigur Kristian í Vági Eliasen, sum spælir bass í Flux.

– Eg veit ikki, um aðrir bólkar hava havt tað soleiðis, men vit hava merkt eitt nógv størri áhuga fyri bólkinum, síðani vit spældu til Prixið.

Flux hevur spælt á tveimum konsertum seinastu vikurnar, og teir hava tvær aðrar uppgávur fyri framman.

### Mind's Eye brak

Kanska mest klokkureina gjøgnumbrotið í Prixnum higartil hevur bólkurin Mind's Eye úr Klaksvík fingið.

Bólkurin hevði ongantíð spælt alment, tá ið teir fóru á Prix-pallin í Fuglafirði fyrst í februar, men síðani hevur rættiliga verið boð eftir teimum.

Teir hava spælt í Klaksvík, Gøtu og Havn, og teir skulu í næstum til Suðuroyar at spæla. Harafturat streyk bólkurin eisini inn á 15 tær bestu seinast leygarkvøldið.

– Ein av orsøkunum til, at vit fóru við í Prixið, var fyri at koma meira fram, og tað hevur rættiliga eydnast. Tað eru vit sera fegnir um, sigur Eyðun Mortensen, sum er sangari í bólkinum.

Mind's Eye venur nú fram ímóti hálvfinaluni í Prixnum, sum verður hildin leygarkvøldið 15. februar. Tá skal bólkurin kappast við fýra aðrar um eitt finalupláss.

### Væl móttiknir

Á hitlistanum hjá Útvarpinum eru nógvir Prix-bólkar um boðið í hesum døgum. Seinasta leygarkvøld komu tríggir sangir, sum eru tiknir upp seinastu vikurnar í Fuglafirði, inn á 15 tær bestu, og longu hesa vikuna eru tríggir aðrir bólkar um boðið.

Tað er líkt til, at føroyski ungdómurin tekur tónleikin hjá hesum bólkum til sín, bæði tá ið tað skal atkvøðast til 15 tær bestu, og tá ið teir eru á pallinum til stórar konsertir.

– Vit hava merkt, at fólk taka væl ímóti okkara tónleiki, tá ið vit eru úti og spæla. Kanska er tað við at henda eitt broyting á føroyska tónleikapallinum í hesum døgum, sigur Kristian í Vági, sum spælir við í Flux.